## Roykirúm á Skarv

Á heimasíðuni hjá føroyska vertshúsinum í Keypmannahavn, Skarv, er atkvøðugreiðsla, har til ber at atkvøða, hvørt roykirúm skal gerast á Skarv. Tað hendir eftir, at royking hevur fingið drúgva umrøðu og eftir at roykfrí tiltøk hava verið. Spurningurin er, um ein ynskir roykirúm á Skarv, og 46% siga ja, 49% siga nei og 5% siga seg ikki vita. Tað skal tó viðmerkjast, at enn hava bert 149 verið á síðuni og atkvøtt, so tølini mugu takast við fyrivarni.




## Metvitjan í Svimjihøllini í Klaksvík

Fyri stuttum lat Svimjihøllin í Klaksvík uppp við nýggjum baðilandi og hetta hevur lokkað fleiri vitjandi í høllina. Fyrsta mánaðin høllin hevur verið opin við nýggja baðilandinum, hava heili 7600 vitjað høllina. Hetta er met, tí vanliga talið liggur um 2000 vitjandi í juni og juli. Tá Summarfestivalur er, verður høllin vanliga eisini betri vitjað, enn vanligt, og serliga eru tað tey sum liggja í tjaldi og tey, sum eru við báti, ið nýta høllina .Nú baðiland er komið í høllina við nýggju økuni, so hava børnini eisini okkurt at fara til á festivalinum, umframt Silvalandið

# Tunnil undir Tangafirði sum skjótast

**Bjarni Djurholm vísir staðiliga aftur, at hann og Vinnumálaráðið á nakran hátt royna at mótarbeiða einum tunli undir Tangafirði. Tvørturímóti heldur hann hetta verða eina framúr skilagóða og samfelagsgagnliga verkætlan**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í bløðunumn um dagarnar fær Bjarni Djurholm og Vinnumálaráðið toyggið frá millum annað valfeløgunum í Eysturoy, har róð verður upp undir, at landsstýrismaðurin skal hava hug at mótarbeiða verkætlanini. Men hetta er langt frá veruleikanum, sigur Bjarni Djurholm.

- Eg havi sjálvur - og Vinnumálaráðið eisini - ferð eftir ferð boðað frá, at ætlanin eigur at fara í gongd, ongantíð ov skjótt. Og eg havi somuleiðis verið ógvuliga takksamur fyri tað stóra arbeiði, sum fyrireikingarnevndini hevur gjørt við at lýsa arbeiðið og at gera uppskot til verkætlanina, sigur Bjarni Djurholm.

Í tunnilshøpi er tað jú nakað nýtt, at privatir skulu standa fyri arbeiðinum.

- Hetta er fyrstu ferð, at privatir gera part av samferðslukervinum, og tí ikki nakað, vit hava roynt fyrr. Og í veruleikanum hava verið fýra møguleikar at fremja arbeiðið upp á, sigur landsstýrismaðurin.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, er á ongan hátt ímóti verkætlanini um ein tunnil undir Tangafjørð, tvørturímóti.*
*Savnsmynd*

Fyrsti møguleikin er tann, sum hevur verið vanligur higartil, at landið ger tunnilin, eins og allir landtunlar eru gjørdir áður. Men hetta fer at binda íløgur landskassans í nógv ár fram.

Næsti møguleikin er at gera eitt alment partafelag, sum stendur fyri arbeiðinum, eins og vit kenna tað frá Vága- og Norðoyatunlinum.

Triði mguleikin er at bjóða loyvið at byggja tunnil út. Landsstýrið kundi so tikið upp samráðingar við tey, ið høvdu bestu verkætlanina.

Og fjórði møguleikin er so tann, sum í dag er aktuellur, nevniliga at privatir venda sær til landið og biða um loyvi at fara undir verkætlanina.

### Krevur neyva kanning

- Allir fýra møguleikar hava fyrimunir og vansar. Og fyri at tryggja, at hesir stigtakararnir eru dugnaligir og megna at fremja verkætlanina, legði eg uppskot fyri løgtingið at fáa heimild at samráðast við fyrireikararnar. Hesa heimild fekk eg so tíðliga í summar, og fyrsti fundurin hevur longu verið, ein góður fundur, har avgjørt var at halda fram við ætlanini, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin vísir á, at her verður ikki bert talan um at geva privatum loyvi at byggja ein undirsjóvartunnil, her verður talan um at lata eitt loyvi, sum skal vara í eini 30 ár fram í tíðina. Og tí krevur tað gjølliga viðgerð og kanningar.

- Men eg ynski og vóni, at arbeiðið, sum vit nú hava sett hol á, ber á mál, og at verkætlanin kann fara í gongd so skjótt sum tilber, sigur B jarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað í øllum málum er álagt honum at kunna løgtingið fult og heilt, og at Landsverk ger sær sínar meting-ar av verkætlanum, er púra vanligt og einki nýtt.

- Ákoyringarnar ímóti mær um, at eg vil forða verkætlanini eru tí púra burturvið. At LV ger metingar um, at inntøkurnar frá einum tunli kunnu nýtast at rinda ein annan tunnil við, er ikki nakað nýtt. Og tá tað kemur til brúgv um Saltnesgrynnuna, so er tað ikki nakað, ið hvørki eg ella Vinnumálaráðið nakrantíð hava mælt til. Hetta var heilt einfalt partur av tilfarinum, sum eg eri álagdur at kunna løgtingið um, sigur Bjarni Djurholm.

### Ógrundað

Hann vísit tí staðiliga aftur, at hann skal vera ímóti einum undirsjóvartunli undir Tangafirði. Tí støðan er hin beint øvugta.

- Eg havi nettup sagt, at ein undirsjóvartunnil undir Tangafirði er skilabesta loysnin, eisini samfelagsbúskaparliga, so at ákæra meg fyri at royna at forða fyri hesi verkætlan er púra burturvið, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur seg fegin vilja viðvirka til, at verkætlanin verður veruleiki, og at hann vónar, at málið verður loyst sum skjótast.

- So kritikkurin í bløðunum nú um dagarnar er púra ógrundaður, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum.

# Leys av Danmark 2015

**Jørgen Niclasen var óvanliga sjálvstýrissinnaður í framløgu síni, tá viðgerðin av løgmansrøðuni var fyri á tingi í morgun**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í politiska spektrinum er Fólkaflokkurin ein sjálvstýrissinnaður flokkur, men ongantíð hevur hann verið meiri sjálvstýrissinnaður og ítøkiligur, enn formaður floksins á tingi í framløgurøðu síni í viðgerðini av løgmansrøðuni var.

Hann samanbar føroysku menningina við uppvøksturin hjá einum barni. Hann metti, at vit nú vóru komin í seinnapartin av tannárunum, og at tíðin tí nú er komin til, at vit seta føtur undir egið borð.

- Vit hava ein rímiliga stóran búskaparligan vøkstur, og tí áttu vit at tikið helmingin av hesum vøkstri at betra um vælferðina, meðan hin helmingurin eigur at verða nýttur til at skerja danska stuðulin, segði Jørgen Niclasaen.

Hann helt eisini, at ikki bert fíggjarliga eru vit komin hartil, at vit skulu standa á egnum beinum, men eisini politiskt eiga vit at gerast sjálvbjargin.

- Vit hava í dag 22 økir, sum enn ikki eru á føroyskum hondum, burtursæð frá teimum, sum hava við ríkisrættin at gera. Tað er einki í vegin fyri, at vit hava yvirtikið hesi innan ár 2015, og tá mugu vit eisini hava skipað soleiðis fyri, at fólkið hevur talað í ríkisrættarliga málinum, segði Jørgen Niclasen í viðgerðini av løgmansrøðuni í morgun.



*Jørgen Niclasen mælti í umrøðu síni av løgmansrøðuni í morgun til, at Føryar miða ímóti sjálvstýri, fíggjarliga og politiskt, í seinasta lagi ár 2015.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*